# TANN STÓRI BÝURIN 1. FLOKKUR

STIG FYRI STIG - VEGLEIÐING TIL LÆRARAN

## Um tilfarið

Tann stóri býurin hevur fýra tekningar, sum kunnu verða settar saman til eina stóra ferðslumynd, umframt uppgávur til næmingarnar. Tilfarið er hóskandi at brúka aftur at "Alvi og Ria fara gongutúr" og verkligu gonguroyndini.

Tilfarið er gjørt soleiðis, at tú kanst nýta tað, sum tú heldur hóskar flokkinum best. Mælt verður tó til, at næmingarnir loysa uppgávurnar 1-3 hvør sær, og at uppgáva 4 umframt aðrar uppgávur verða loystar saman í flokkinum.

## Framferðarháttur

1. **Gev næmingunum tekningar og uppgávur, fyrst tekning 1 saman við uppgávu 1, síðan tekning 2 saman við uppgávu 2 og so framvegis.**
2. **Bið næmingarnar seta tær fýra tekningarnar saman til eina stóra ferðslumynd við límí ella klistribandi. Tit kunnu lita myndina.**
3. **Gev næmingunum síðstu uppgávurnar, sum teir loysa við at hyggja at savnaðu myndini av Tí stóra býnum.**

   Nýt bæði uppgávur og ferðslumynd at fáa í lag kjak í flokkinum um ymsu støðurnar í ferðsluni.
4. **Tit kunnu enda við at heingja myndirnar av Tí stóra býnum upp í floksstovuni.**

**Minst til at**

skriva út tekning 1,2, 3 og 4
og uppgávu 1, 2, 3 og 4



Tilfar brúkt við loyvi frá: RÅDET FOR SIKKER TRAFIK